## Maradona er við at koma seg

Argentinski yndisleikarin gjøgnum tíðirnar, Diego Maradona, er við at koma seg, eftir hann fyri stuttum varð innlagdur á sjúkrahús í Buenos Aires. Hetta sigur lækni hansara, Alfredo Cahe. Maradona varð innlagdur vegna sítt ósunna likam, sum hann hevur havt trupulleikar við áður. Lænarnir vóru tó skjótir at siga, at Maradona ikki var í lívsvanda. Nú væntast hann at verða útskrivaður fyrsta dagin, men hann skala binda fullkomnan frið næstu dagarnar.

## Holst sat leikbann av sær

Lyngby legði seg klárt á odda í donsku 1. deild, tá ið liðið sunnudagin vann 1-0 í dystinum ímóti Ølstykke. Einasta málið í dystinm var eitt dreymamál frá Mikkel Bechman miskeiðis í seinna hálvleiki. Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst er millum stuðulsspælararnar á liðnum hjá Lyngby, men hesaferð noyddist hann at verða áskoðari, tí hann hevði leikbann. Lyngby er nummar 1 í 1. deild við 36 stigum. SønderjydskE hevur 32 stig.



# tjørnuna

**FAKTA**

Stjørnan-VB 24-17 (11-7)
Málskjúttar:
Stjørnan: Alina Olaru 11 (5), Simona Petersen 8, Bára S. Klakkstein 2, Joan M. Djordjevic 1, Durita Christophersen 1, Una Olsen 1
VB: Daiva Tuomaite 6 (2), Gurið Mortensen 3 (1), Laila Jespersen 3, Maja Sølvsten 2, Rannvá Johannesen 1, Margreth Augustinussen 1, Una Egilsdóttir 1
Brotskøst: Stjørnan 5, VB 6
Útvísingar: Stjørnan 3, VB 2
Dómarar: Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

tær blivu revsaðar í hinum endanum, og tá gerst ikki lætt.

### Alina og Simona avgjørdu

Tveir av leikarunum, sum veruliga gjørdu um seg hjá Stjørnuni henda dagin, vóru Alina Olaru og Simona Petersen, og tað vóru eisini hesar báðar, sum endaliga avgjørdu dystin út á seinna hálvleik.

Serliga Alina vísti seg at vera ógvuliga stinn henda dagin, og hon var ein brandur í verjuni. Í fleiri umførum fangaði hon bóltar frá VB-leikarum, og so rann hon í skjót mótálop. Einsamøll við Astu knallaði hon allar bóltarnar í netið, og hesi málini gjørdist avgerandi fyri dystin. Hon var eisini sera trygg við brotskøstunum, har hon skoraði øll fimm brotskøstini, sum Stjørnan fekk.

Simona spældi eisini ein avbera góðan dyst. Hennara rástyrki gjørdi, at VB hevði stórar trupulleikar at steðga henni í verjuni, og so fekk hon eisini fleiri mál uppá mótálop, har Stjørnan fangaði bóltin, og so streyk Simona avstað.

Um miðjan seinna hálvleik vóru tað eisini júst hesar báðar, sum avgjørdu dystin. Frá støðuni 15-11 skoraðu tær fimm mál á rað, og so stóð brádliga 20-13 við tíggju minuttum eftir, og her tóktist alt vera avgjørt.

### Stjørnan vann greipuna

Síðstu tíggju minuttirnar av dystinum var eingin, sum ivaðist í, at Stjørnan fór at vinna. Henda tíðin skuldi bara ganga, tí VB hevði einki aftursvar ímóti sterka spælinum hjá Stjørnuni.

Eitt skifti seint í dystinum megnaði Stjørnan at leggja seg á odda við níggju málum, áðrenn venjarin, Henrik Gerster, valdi at taka time-out, og tá Stjørnan kom inn-aftur á vøllin, vóru fleiri av heilt ungu leikarunum á liðnum.

Síðstu tríggjar minuttirnar megnaði VB at pynta um úrslitið, og at enda vann Stjørnan fystin 24-17. Sigurin kundi eingin tó siga nakað um, tí Stjørnan var sjey mál betri enn VB henda dagin, og meistaraheitið má sigast at vera fult uppiborið.

Við hesum seinasta sigrinum endurvann Stjørnan sostatt meistaraheitið, samstundis sum tær gjørdust greipuvinnarar. Leikararnir hjá Stjørnuni eru sostatt tær stjørnurnar, sum í løtuni lýsa bjartast í føroyska hondbóltsheiminum.

**Í morgin hava vit liðmyndir av føroyameistarunum í mans- og kvinnuhondbólti 2007 við í blaðnum.**



*Stjørnan vann fyrr í ár steypakappingina, og sunnudagin fingu tær gullmerkini fyri FM-heitið handað*

*Mynd: Høgni Thomsen*

Stjørnan-VB 25-21 (13-12):

# Verjan steðgaði VB-vónunum

**Talan var sjáldan um tað heilt vakra hondbóltsspæli, men eitt sera gott verjuavrik vissaði Stjørnuni rætt til triða finaludystin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað stóð nógv á Stjørnuni, tá tær leygardagin spældu næstu FM-finaluna. FM-vónirnar hjá VB vóru, at í minsta lagi ein javnleikur fekst úr dystinum, og hetta høvdu einir 200 áskoðarar góðar vónir um, tá hesi rúgvaðu væl upp í ljóðrúminum í KÍ-høllini.

### Nervar gjørdu um seg

Og hóast Stjørnan enn var greiður favorittur, so var sjónligt, at nervarnir høvdu sítt at siga fyrstu longu løtuna. Tær høvdu fleiri góðar møguleikar til veruliga at leggja sjógv niður til VB, men vánaligar skotroyndir saman við góðum málmansspæli frá Astu Armonavi byrgdu upp fyri hesum.

Og samstundis spældi VB veruliga fyri sínum møguleika. Ikki óvæntað var tað Daiva Toumaite, sum gjørdi mest um seg, og eitt skifti tóktist hon eisini hava megina til sjálv at gera alt av.

Stjørnan valdi nevnliga ikki at mansverja hana, og tó at miðblokkurin hjá heimaliðnum royndi at vera kompaktur, so fingu tær ikki steðga langlimaða litavanum hjá VB. Í øllum førum ikki fyrstu løtuna.

Tað batnaði tó munandi, tá Alina otaðu seg longur út eftir Daivu. Góða spælskilið hjá rumenska stórspælaranum hjá Stjørnuni fekk aloftast darvað Daivu nakað, og tá restin av verjuni nú veruliga byrjaði at stríðast fyri bóltunum, gjørdist tað tungt hjá VB. Enn megnaðu tær tó at revsa, tá Stjørnan í sínum lagi framdi mistøk, men tað stóð greitt, at talan kundi verða um sera tungan seinna hálva tíma hjá gestunum.

### Høvdu eitt jarntak

Og tað gjørdist tað sum so eisini. Frá byrjan av seinna hálvleiki tóktist Stjørnan hava tveitt nervarnar burtur. Tær vunnu seg skjótt eini trý mál framum, og tó at munurin ikki vaks stórt meira eftir hetta, so høvdu tær alla tíðina dystin í einum jarntaki.

Framvegis var tað fyrst og fremst í verjuni, at dysturin varð vunnin, men hartil fekk Simona Petersen eisini gott rásarúm í álopinum. Og við stóru skotstyrkini revsaði hon ferð eftir ferð VB-verjuna.

Og at enda tóktist kropsliga yvirvágin hjá vertunum eisini sálarlig móti einum alt meira uppgevandi VB-liði. Tí hóast hesar enn høvdu ein møguleika at avgera tingini til egnan fyrimun, so sást á flestu brøgdum, at hetta var møguleikin. At byrja við so ljóðligi VB-parturin av KÍ-høllini fánaði alt meira burtur, og ístaðin rungaðu heimarópini alt meira. Eisini hóast keðiligu hendingina við hallarvarparanum móti dystarenda.

**FAKTA**

**Stjørnan-VB 25-21 (13-12)**
Næsta av trimum finalum
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 9, Joan Midjord Djordjevic 4, Bára Skaale Klakstein 4, Alina Olaru 3(1), Durita Christophersen 2, Una Olsen 2, Anna Kristina Samson 1
**VB:** Daiva Toumaite 8(3), Gurið Mortensen 4(2), Rannvá Johannesen 3, Laila Jespersen 2, Svava Vestergaard 2, Margreth Augustinussen 11, Maja Sølvsten 1
**Brotskøst:** Stjørnan 1, VB 8
**Útvísingar:** Stjørnan 2, VB 2
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen.